# Fundarbók hjá Eysturkommunu
# 520 Leirvík

_________/_________ Síða

Jóhan Christiansen, borgarst./ Erik Lervig, skr.

**Býráðsfundur mánadagin 02. februar 2017 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| 1. | **16/00007**<br>**Nýggjur dagstovnur í Eysturkommunu**<br>Um arbeiðsbólkurin framyvir skal verða virkin í mun til tilgongdina av gera nýggjan dagstovn við Gøtugjógv, skulu 2 nýggj politisk umboð veljast.<br><br>Trivnaðarnevndin mælir til, at arbeiðsbólkurin heldur fram. Bólkurin verður mannaður fylgjandi: Tvey politisk umboð, eitt umboð fyri leiðsluna á Gjáa, eitt foreldraumboð, eitt starvsfólkaumboð og eitt umboð fyri leiðsluna í Eysturkommunu. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini, og at trivnaðarnevndin og byggi- og býarskipanarnevndin velja hvør sítt umboð í nevndina. |
| 2. | **16/00422**<br>**Tannlæknaviðurskiftini í Eysturkommunu**<br>Framtíðar tænnlæknaviðurskifitini í barnatannrøktini hjá Eysturkommunu.<br><br>Tilmæli fyriliggur | Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi tilmæli frá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.<br><br>*Málið viðgjørt fyri afturlætnum hurðum.* |
| 3. | **15/00317**<br>**Vegnavn til nýggjan veg/vegir í Syðrugøtu – útstykking úti við Rætt**<br>Navnanevndin mælir til at brúka fylgjandi veganøvn til nýggju vegirnar í Syðrugøtu:<br><br>• Salvarávegur (niðari vegurin)<br>• Traðarávegur (ovari vegurin)<br><br>Viðmerkingar:<br>Aftaná rulliportið (forlongt frá Túvuvegi) er uppskot um, at vegurin fær navn eftir triðju ánni úti við Syðrugøtulandinum, Breiðá: Breiðávegur<br><br>Eitt annað uppskot er, at vegurin frá svinginum og út á rættina í Syðrugøtu fær navnið Mýravegur. Harafturat er at viðmerkja: Undir Garðagøtu í Syðrugøtu skal vegur helst gerast. Og her er vert at nevna, at gamla Navnanevndin í Gøtu Kommunu mælti til, at hesin vegurin skuldi eita “á Gørðum”, eftir handlinum hjá Grækaris á Gørðum. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá navnanevndini. |

**Býráðsfundur mánadagin 02. februar 2017 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

**4. 17/00011**

**Val av 2 limum í felags barnaverndina hjá Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu**
Trivnaðarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingin at velja Hugo Leo, Leirvík og Elin Olsen, Syðrugøta

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

**5. 17/00034**

**Umsókn um neyst til endurstovnað kappróðrarfelag**
Stigtakarar eru í gongd við at endurstovna kappróður í Eysturkommunu. Stigtakararnir søkja kommununa um at veita atgondgd til eitt neyst í Gøtu.

Mentanarnevndin mælir til at veita kappróðrafelagnum atgongd til bæði neystini, matr. nr. 170 og 171.a í Norðragøtu, treyta av at kappróðrarfelagið verður stovnað.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

*Gudny Langgaard av úti undir viðgerðini vegna ógegni.*

**6. 17/00015**

**Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 167 í Syðrugøtu**
Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um sundurbýti av matr. nr. 167, sundurbytið fevnir um matrikul við ábygdum sethúsum við Deildarvegin og úthús sum stendur við vegin Húsgarð.

Økið hevur áseting F, ið er Almenn frítíðarøki og mentanarøki.

Byggi- og byarskipanarnevndin mælir til at umsøkjarin fær loyvi til at fremja sundurbýti av matr. nr. 167 í Syðrugøtu.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**7. 17/00027**

**Fab Lab**
Miðnámskúlin á Kambsdali arbeiðir við at fáa eitt Fab Lab til skúlan. 300.000,00 kr. eru settar av á landsins fíggjarlóg til Fab Lab, og Fuglafjarðar kommuna hevur givið tilsøgn á 100.000,00 kr. Harumframt hava partar av vinnulívinum givið

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 02. februar 2017 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

munnliga tilsøgn um kepa av hardware o.l.

Vinnunevndin mælir til at geva verkætlanini tilsøgn á 100.000,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og at peningurin verður tikin av konto 4.23.22.510 -20 (Fólkaskúlin, framhaldsdeild).

**8. 16/00000**

**Fundardagar 2017**

Føstu almennu býráðsfundinir í 2017 verða hesir:

| | |
|---|---|
| 03-02-2017 | Hósdag |
| 27-02-2017 | Mánadag |
| 27-03-2017 | Mánadag |
| 01-05-2017 | Mánadag |
| 29-05-2017 | Mánadag |
| 26-06-2017 | Mánadag |
| 31-08-2017 | Hósdag |
| 25-09-2017 | Mánadag |
| 30-10-2017 | Mánadag |
| 27-11-2017 | Mánadag |
| 15-12-2017 | Fríggjadag |

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Gudny Langgaard ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

**Býráðsfundur mánadagin 02. februar 2017 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hans Mourits Foldbo, Gudny Langgaard, Tollakur Joensen, Hanna Jensen, Árni Jacobsen, Uni Rasmussen, Hjalti Dalheim, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 21.00**

Hjalti Dalheim ________________________________________

Brandur Jacobsen ________________________________________

Uni Rasmussen ________________________________________